# FRELST UPP Á TA



**UMHVØRVI** Lindenskov úr Havn hevur í fleiri ár roynt at livað so umhvørvisvinarliga sum til ber. Men seinastu trý árini hava hon og maðurin, Høgni Rasmussen, lagt seg eftir at koma á botn í dálkandi forbrúki. Og tað hevur loyst seg sera væl, bæði so og so...

Rigmor Dam

Meiri enn fimm túsund skattafríar krónur eyka at jolla sær fyri um árið. Hetta er upphæddin, sum Elin Lindenskov og Høgni Rasmussen hava spart, síðan tey fyri trimum árum síðani settu seg fyri at liva meira umhvørvisvinarliga, serliga við at minka um elnýtsluna.

– Og tað má eg siga, tað størsta yvirraskilsi var, tá rokningin kom frá Sev. Vit jublaðu, sigur Elin Lindenskov, sum hevur góða grund til at vera áhugað í at liva umhvørvisvinarligt. Hon hevur nevniliga verið forkvinna í umhvørvisnevndini hjá Tórshanvar Kommunu í fleiri ár, og tískil havt serliga skyldu til at seta seg inn í, hvussu til ber at liva meira umhvørvisvinarligt.

– Fremsta orsøkin til, at vit hava valt at fokusera so nógv upp á at umleggja el-forbrúkið hevur verið at verja umhvørvið. Men tað er absolutt heldur ikki so galið at hava fleiri pengar til tað stuttliga í lívinum, sigur Elin Lindenskov, sum var tann í húskinum, sum tók stig til at dálka minni.

– Høgni helt kanska ikki, at tað var so spennandi í fyrstanni. Men tá hann sá, at tað loysti seg, fór hann eisini meira miðvíst til verka.

## Stór minking

Seinastu árini hava tey bæði búð í byggirokið, tí húsini hava verið umvæld. Enn er nakað eftir, eitt nú køkurin. Men umvælingarnar hava eisini latið upp fyri at skifta út stóru orkuslúkarnar innan hvítvørur, umframt at bjálva húsini betri. Og so hava vanabroytingar eisini havt stóra ávirkan á minkingina.

Tá vit hyggja eftir Sev-rokningunum seinastu trý árini sæst, at tey hava fingið fitt av túsundkrónuseðlum útgoldnar síðst í árinum. Harumframt er mánaðarliga el-rokningin minkað úr 800 krónum niður í 300 krónur.

## Hugsa seg væl um

Men tað er ikki alt. Sama tíðarskeið hava tey eisini spart olju, uttan tó at fara so íðin til verka, sum við streyminum, ið sum kunnugt er lættari at máta og rokna út, enn »svingandi« oljan – bæði í prísi og nøgd. Men á ársuppgerðini sæst, at tey eru farin úr 3.203 litrum í 2006 niður í 2.598 í 2009. Við dagsins oljuprísi á 6,20 liturin gevur tað eina sparing upp á umleið 4000 krónur hesi árini.

Sostatt hevur tað loyst seg væl at hugsað seg um einaferð eyka, áðrenn kontaktin ella radiatorurin verða tendrað.

## Fingið húshjálp

Men hvat hava tey so brúkt allar hesar pengarnar til, forvitnast vit?

– Vit hava ikki verið so nógv úti um okkum við pengunum. Men tað munar at hava fleiri hundrað krónur eyka um mánaðin, sigur Elin, og hugsar seg um eina løtu.

Áh jú, forrestin – har var eitt, sum vit keyptu okkum. Ein robotdustsúgvara fyri 2.500 krónur, sum vit tendrað um morgunin, tá vit fara til arbeiðis, og so er húsið avblást, tá vit koma heim. Hann stendur og løðir um náttina, og brúkar ikki meira streym enn ein lítil fartelefon. So vit hava fingið eina fína húshjálp fyri pengarnar, staðfestir Elin hugagóð.

*Rigmor@sosialurin.fo*